

# Stórur áhugi fyri arktiskum tiltaki á Fólkatingi

**Jan Müller**

17.04.2015 - 16:51

Oljan.fo

Ikki færri enn 120 umboð fyri fyritøkur, stovnar og feløg í Danmark, Føroyum og Grønlandi hava boðað frá luttøku, tá Fólkatingið mánadagin letur dyrnar upp fyri eini ráðstevnu um framtíðar leiklutin hjá londunum í Ríkisfelagsskapinum í Arktis. Tað er Arktiski arbeiðsbólkurin á Fólkatingi, sum hevur tikið stig til tiltakið. Formaður í bólkinum er føroyski fólkatingsmaðurin Sjúrður Skaale. Ráðstevnan, sum byrjar mánadagin kl. 13, verður hildin í Landstingssalinum.

Nú tað nærkast vinnuráðstevnuni á Fólkatingi má sigast, at áhugin fyri tiltakinum er sera stórur. Tiltakið er fult teknað.Millum áhoyrarnar á ráðstevnuni vera umboð fyri Dansk

Industri, Dansk Erhverv, Norden, Hello Norden, Nora, Polar DTU og Søfartsstyrelsen. Harumframt koma umboð fyri Front Communication, ið hevur drúgvar royndir við at lýsa grønlendskt vinnulív, og umboð frá Shipping DK, Blue Water Shipping, Viking Supply Ships og A.P. Møller – Mærsk. Frá miðlunum koma umboð frá Berlinske og DR, frá advokatabransjuni umboð frá Horten og Kromann Reumert, og frá byggivinnuni koma umboð frá Rambøll og MT Højgaard. Føroyska, grønlendska, norska, japanska og russiska sendistovan hava eisini meldað fólk til ráðstevnuna. Harumframt eru fleiri fólk frá bæði størri og smærri fyritøkum tilmeldaði. Eisini eru fleiri føroyskar fyritøkur við, eitt nú Atlantic Airways.

Oljan.fo spurdi Sjúrða Skaale, hvussu tað ber til, at ráðstevnan verður júst í danska fólkatinginum við luttøku av øllum trimum londum í Ríkisfelagsskapinum.

“Danmark hevur eina topplasering í arktiskum samanhangi og er millum "The Arctic Five" saman við Russlandi, Norra, USA og Canada. Tað er kortini ikki orsakað av Danmark sjálvum men av Grønlandi. Hóast Føroyar ikki spæla so stóran leiklut, so hava Føroyar týdning, tí tær liggja beint á gáttini millum Arktis og Europa.

Og tá nú tað eru Grønland og Føroyar, sum geva danska ríkinum eina serstøðu, so skutu vit í fjør upp, at tað ikki bara skuldi vera stjórnin í donsku skipanini, sum skuldi fáast við hetta, men at tað eisini skuldi skipast ein arktiskur arbeiðsbólkur í Fólkatinginum við m.a. grønlendskari og føroyskari umboðan - og leiðslu. Fyrst var Sara Olsvig úr IA formaður, men tá hon gavst bleiv tað eg sjálvur.

Mítt hugsan er, at arbeiðið skal vera so ítøkiligt sum gjørligt - og vinnurelaterað. Tað skal ikki bara vera luttøka á ráðstevnum við meira ella minni "fluffy" diskussiónum um framtíðina.

Endamálið við hesum tiltakinum er, at ymiskar fyritøkur og myndugleikar, sum hvør á sínum øki hava heilt konkretar vinnuætlanir, greiða frá hvørjum tey arbeiða við.

Endamálið er, at fólk skulu knýta sambond, fáa íblástur og vónandi síggja møguleikar fyri samstarvi.

Áhoyrarar vera vanlig fólk - studentar og onnur - men hetta er eisini eitt "business to business" tiltak. Fólk frá donskum stovnum og úr donskum vinnulívi, sum hava samband við hetta, koma at lurta.Eisini umboð úr Føroyum og Grønlandi. Harumframt koma danskir journalistar.”

Endamál og skrá:

“De ændrede klimaforhold, i den arktiske region, har medført et voksende internationalt fokus på nye økonomiske potentialer i regionen. Erhvervskonferencen vil stille skarpt på erhvervsmuligheder indenfor shipping og nye sejlruter i Arktis fra Europa til Asien, samt nye muligheder for udvikling af turismeerhvervet i Grønland og Færøerne.

Med oplæg fra politikere og erhvervsfolk fra både Danmark, Grønland og Færøerne inviterer Folketingets Arktiske arbejdsgruppe til paneldebat og spørgsmål fra salen.

Moderator: Sjúrdur Skaale, Javnaðarflokkurin

**Mandag den 20. april 13.00 – 16.45**

**I Landstingssalen, Folketinget**

**PROGRAM**

**13.00 – 13.15:**

Åbning af konference: MF Sjúrdur Skaale, formand for Nordisk Råds Arktiske arbejdsgruppe

Skitsering af den færøske og grønlandske økonomi og betydningen af nye erhvervsmuligheder

for økonomien.

**13.15 – 13.45**

**Nye muligheder i Nordatlanten**

Hvilke muligheder er der for erhvervslivet med det øgede fokus på Arktis?

Oplæg fra direktør for Arbejdsgiverforeningen på Færøerne, Marita Rasmussen.

Oplæg fra direktør for Grønlands Arbejdsgiverforening, Brian Buus Pedersen.

Oplæg ved MF Doris Jakobsen, Siumut

**13.45 – 14.45**

**Turisme i Grønland og Færøerne**

Hvilke udfordringer er der for turismen i Grønland og Færøerne? Hvordan kan turistindustrien udnytte det øgede fokus på Arktis og Nordatlanten?

Oplæg fra Visit Faroe Islands, Guðrið Højgaard, direktør.

Oplæg fra Visit Greenland, Anders Stenbakken, direktør.

Case: Arctic Winter games. Hvordan får man Grønlands " Brand" ud i verden i kraft af dette projekt.

Oplæg fra Maliina Abelsen, direktør, Arctic Winter Games.

**14.45 – 15.00 Paneldebat I**

**15.00 – 15.15 Kaffepause**

**15.15 – 16.15**

**Hvordan kan færøsk og grønlandsk erhvervsliv drage**

**nytte af den øgede skibstrafik i Arktis?**

Case: Færøerne som shipping hub

Oplæg om Airport 19, Jóannes Petersen.

Oplæg fra Atlantic Supply Base, Eli Lassen.

Oplæg om udbygning af havnen i Torshavn, Heðin Mortensen, borgmester, Torshavn.

Case: Grønland som shipping hub

Oplæg fra Royal Arctic Line.

Hvilke politiske initiativer efterspørger erhvervslivet for at Nordatlanten kan drage nytte af den øgede skibsaktivitet?

Oplæg fra Morten Glamsø, Chefkonsulent, Danmarks Rederiforening.

**16.25 – 16.40 Paneldebat II**

**16.40 - 16.45 Afsluttende bemærkninger ved MF Johan Lund Olsen, Inuit Ataqatigiit**